# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fiskivinnan í umrøðu

Fiskivinnan er støðið undir føroyska samfelagnum. Gongur fiskivinnuni væl, gongur øllum samfelagnum væl, gongur hesi vinnu illa, so gongur okkum øllum illa. Tað er tí eitt sindur løgið, at fiskivinnupolitikkurin hevur so lítið pláss í almenna rúminum. Undantakið er sjálvsagt tíðin kring ásetingina av fiskidøgum fyri eitt nýtt fiskidagaár, tá bylgjurnar ganga høgt og av álvara avdúka, hvussu grundleggjandi ósamd, ið vit eru um fiskivinnupolitikkin.

Men rætt skal vera rætt, fiskivinnan stendur høgt á dagsskrá hjá ávísum flokkum, tá hesir hava landsfund og søgan um svartkjaftabýtið avdúkar, hvussu stór ósemja er. Fiskurin á føroyskum sjóøki, er ogn Føroya fólks. Breið semja er um hesa áseting, men samstundis er ikki semja um, hvat hetta í roynd og veru merkir. Vit hava eina skipan við fiskidøgum, við fiskiloyvum, kvotum v.m., men vit eru ongantíð veruliga vorðin á einum máli um, hvussu henda ogn Føroya fólks best og mest ábyrgdarfult skal umsitast ei heldur um, hvussu vit tryggja eina burðadygga vinnu.

Orðaskiftið í almenna rúminum um fiskivinnu er avmarkað og fyrst og fremst avmarkað til ávísar fiskivinnuáhugaðar tingmenn, yrkisfelagsmenn og fiskifrøðingar. Fiskifrøðingarnir, sum eftir bestu sannføring mæla til ein fiskiveiðipolitikk, sum er grundaður á vísindaligar kanningar, eru ofta »teir illavorðnu dreingirnir«. Kortini seta teir ta dagskrá, sum hóast alt er í almenna orðaskiftinum. Búskaparfrøðingarir halda seg við fáum undantøkum aftur, halda seg vanliga á heilt øðrum hæddum ájavnt við teirra starvsfelagar í umheiminum. Men av og á koma føroyskir búskapafrøðingar fram við áskoðanum um fiskivinnuna, og eru hesar vanliga eins áhugaverdar og tær vekja forargilsi í veiðiumhvørvinum. Búskaparfrøðingar kunnu jú loyva sær bert at viðgera tað, sum lønar seg og tað sum ikki lønar seg. Í mikudagsblaðnum var ungur føroyskur búskaparfrøðingur frammi við klárari greining av støðuni í fiskivinnuni og við tilsvarandi radikalum uppskotum fiskivinnuni til bata. Hansara uppskot er m. a. at lata tey skip, sum ikki bera seg fara undir hamaran nú fyrr jú betri. Hann tekur fram munin millum eitt nú norska og føroyska fiskivinnu, sum báðar fáa stuðul og grundgevur sakliga fyri muninum millum hesar vinnur. Hann vísir á, at hjá okkum er talan um høvuðsvinnu, sum má og skal rekast so optimalt sum gjørligt t.v.s. uttan almennan studning. Studningspolitikkur er beinleiðis skaðiligur, tá lítið er til av fiski. Tað, sum umræður, er at fáa so nógv burturúr fiskinum, sum er, og ein skipan, sum heldur skipum siglandi, sum ikki bera seg, ger bert støðuna verri. Við at veita einum parti av fiskivinnuni, sum ikki ber seg, andahjálp, minka vit samstundis um møguleikarnar hjá teimum pørtum, sum kundu borið seg. Við støði í hesum heldur hann, at vit skulu lata tann partin, sum ikki ber seg, fara, fyri at bjarga tí parti av vinnuni, sum loysir seg. Hesi eru í stuttum sjónarmiðini, og fara tey valla at falla á góðan botn hjá øllum, men vónandi fáa vit eitt neyðugt og gott orðaskifti burtur úr hesum.

**Sosialurin**

## Summarferian avlýst!



**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður

**Politikarar í Føroyum mugu í arbeiðsklæðini her og nú. Fyrsta uppgávan er at viðgera og semjast um handfaringina av akuttu búskaparog fíggjarstøðuni í landinum. Síðani skal semja fáast um fíggjarlógaruppskotið fyri 2010**

Fíggjar- og búskaparpolitikkurin í Føroyum flýtur.

Skal tað sigast akkurát, sum tað er, so hevur hetta sera týðandi politiska økið verið flótandi leingi.

### Vitleys siðvenja

Bæði uttanfyristandandi og tey, sum hava verið í politikki í nøkur ár, hava lagt til merkis eina vitleysa siðvenju, ið spakuliga hevur sníkt seg inn í arbeiðið við fíggjarlógini.

Mannagongdin er á leið tann, at Landstýrið leggur uppskot um fíggjarlóg fyri Tingið. Frammanundan hava landsstýrismenn og umsiting lagt eitt stórt arbeiði í uppskotið. Góðskan er ymisk alt eftir umstøðunum og tíðarfaktorinum.

Fíggjarlógaruppskotið fer síðani í fíggjarnevndina. Har fer ein syndarligur leikur fram, og góðskan er hareftir.

Fleiri ár á rað hava vit sæð, hvussu nevndin endavendur rakstri og íløgum. Í summum førum eru rímiligar grundgevingar fyri broytingum, men tað nógva av viðgerðini í fíggjarnevndini er primitivt. Har verður býtt sum havnarmaðurin býtti á sinni: tú ein vegastubba – eg ein ella tveir tunnlar.

Nú hendir hetta eisini í svartastu búskaparkreppu, heimurin hevur sæð í mong Harrans ár.

### Primitivt svans

Í ár hava vit harumframt sæð, at góðskan í fíggjarlógaruppskotinum hevur verið so sum so. Uppskotið hevur meira enn nakað annað verið eitt savn av tekniskum framskrivingum. Fleiri hava saknað initiativ úr Fíggjarmálaráðnum, og helst hava hesi grein í sínum máli.

Hetta óskil má fáa ein enda. Primitiva svansið við landsins ognum má steðga.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ikki ein varandi arbeiðsháttur í einum landi, ið roynir at flokka seg millum siviliserað lond.

### Til arbeiðis nú

Mítt uppskot er, at tingfólk beinanvegin fara í arbeiðsklæði.

Tingið eigur beinanvegin at fara undir at viðgera akuttu fíggjar- og búskaparligu avbjóðingarnar í landinum. Tá tað arbeiðið er liðugt, skulu vit beinanvegin fara undir uppskotið til fíggjarlóg fyri 2010.

Í framkomnum londun byrjar fíggjarlógararbeiðið beinanvegin, og áðrenn verandi tingsetan er endað. Tá fara óformligar tingingar fram millum allar flokkar á Tingi. Hetta arbeiði ber frukt, tí allir flokkar kenna sær ábyrgd, tí teir eru veruliga við. Breiðar semjur fáast um bróðurpartin av fíggjarlógini. Seinni um heystið, áðrenn fíggjarlógin verður framlagt, verða ábyrgarfólk fyri allar flokkar somuleiðis inkallað fyri at royna semjur. Endaligu smálutirnir fella síðani upp á pláss móti endanum av árinum, ofta við smalri meirluta.

### Sporini frá 80-unum ræða

Sum ein av teimum, ið ruddaðu upp eftir vitloysið í 1980-árunum, má eg siga, at sporini ræða.

Her má annað skinn takast um bak. Um ábyrgdarfólk ikki handla við skili her og nú, er vandi fyri, at onnur fara at seta treytir og á tann hátt at handla fyri okkum. Tað hava vit sæð áður.

Politiska summarferian er avlýst!

## Rætting

Í blaðnum í gjár bóru vit tíðindini um nýføddu koltursgentuna, sum er fyrstføddi íbúgvi í Koltri seinastu mongu árini. Á redaktióníni komu vit fram til, at seinasta barn í Koltri varð føtt fyri 30 árum síðan. Men ein lesari hevur gjørt okkum varug við, at eitt koltursbarn varð føtt 10 ár seinni, altso fyri 20 árum síðan. Talan er um tveir brøður, ið vórðu føddir í 1987 og 1989, og sum vóru búsitandi í Koltri tá.

Tí biðja vit lesararnar um umbering fyri feilin.

***Eilen Anthoniussen, blaðkvinna***

## Samkynd eru eisini føroyingar

**BEINTA LØWE JACOBSEN**
Journalistur

Undir viðgerðini av revsilógini kom einaferð enn fram, hvussu ávísir tinglimir háða ávísar samfelagsbólkar – í hesum førinum samkynd. Á tingsins røðarapalli var tað at vera samkynt skírt at vera óføroyskt. Haldi at tað er ræðandi, at vit í einum framkomnum demokratiskum samfelag skulu uppliva, at fólkavaldu tinglimir okkara leggja eftir ávísum samfelagsbólkum og skíra okkum óføroysk. Hava tit nakra hóming av, hvussu tað er at verða skírd óføroysk, tí ein er samkynt/ur? Hví skulu vit vera verri føroyingar, tí vit eru samkynd? Lat meg sláa fast, at tað finnast nógvir samkyntir føroyingar, og at hetta als ikki er eitt óføroyskt fyribrygdi. Vit eru eisini føroyingar, og vit eru til staðar í føroyska samfelagnum, og eru eisini góð við Føroyar og føroyska samfelagið. Tí nívir tað, at verða skírd óføroysk.

Stundin er tí komin, at føroyskir politkarar taka avgerðir út frá veruleikanum.

At løgtingið við 2. viðgerð samtykti at taka 266b, stk. 2. burtur, og eisini samtykkir at strika orðingina »seksuel orientering« úr tveimun øðrum greinum, vísir enn einaðferð, at tað eru religiøsu fundamentalistisku kreftirnar, ið stýra løgtinginum og harvið eisini Føroyum. Eg vóni, at tingfólk eru at sær komin og fella uppskotið við 3. viðgerð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.